# TAÐ FRÍA LÍVIÐ



## Fakta

**MS Queen Victoria**
Smíðiár: 2007
Longd: 294 m
Hædd 23,5 m
Ferð: 23,7 míl
Stødd: 90.000 brt
Starvsfólk: 1253
Ferðafólk 2014/2250

Tólv ferðafólkadekk, sjey matstovur, 13 barrir, ein veitsluhøll, pallir, biografar, vælveruhøll, casino, spa, bókasavn, tríggjar svimjihyljar, finsk sauna, golf o.m.a.

Miami og stóð fyri ymiskum verkætlanum. Hetta var meðan Queen Mary II varð smíðað. Tað var eisini ein góð tíð við átta tíma arbeiðsdegi, og tað merkti m.a. at hon kundi tekna seg til ymist um kvøldið. Tað ber ikki til, tá ið hon siglir, sjálvt um hon hevur eina góða skipan við hálvum fjórða mánaði úti og trimum mánaðum heima.

Øll hesi árini hevur hon siglt við fleiri ymiskum skipum.

Nú hevur hon ferðast so nógv runt í heiminum, at hon kennir tey spennandi støðini, og ferðatrongdin er mettað.

– Av tí sama eri eg eisini farin at raðfesta meg sjálva meira, sigur Ingerð, sum hevur valt at liva sum støð.

### Á toppinum

Ingerð er fegin um at verða útnevnd til kapteyn á Queen Victoria, men hinvegin merkir tað, at hon einki meira hevur at miða eftir í arbeiðslívinum. Hon sleppur ikki longur upp á stiganum enn at vera kapteynur.

Tað er eingin munur á, um kapteynurin er kvinna ella maður, tí bæði kyn eru líka væl før fyri at røkja slíkt arbeiði.

– Eg kann mæla øðrum kvinnum til at søkja inn í hesa vinnuna, men tað krevur at hava hug til slíkt arbeiði, og tað krevur eisini at leggja lívið eftir tí, sigur Ingerð, sum eisini heldur, at góðir arbeiðsmøguleikar eru fyri føroyingar á teimum stóra rundferðarskipunum.

Hon hevur havt fleiri kvinnuligar stýrimenn undir sær hesi árini, men fyri tað mesta sigla kvinnur ikki í so nógv ár. Tá ið tær finna sær mann og fáa børn, fara tær í land, og oftast fara tær ikki út aftur at sigla.

– Vit síggja eisini, at tey fægstu reiðaríini hava farloyvisskipanir. Tað hevur stutt sagt ikki verið brúk fyri teimum.

Ingerð heldur, at aftra kvinnur seg við at fara við skipum og vera heimanifrá í fleiri mánaðir, kundu tær siglt við ferjum, ið koma inn hvørt kvøld. Ella kundu tær farið við skipum og verið 14 dagar úti og 14 dagar heima. Men tað krevur, at maður og kona duga at innrætta seg eftir tí.

### Royndirnar kunnu brúkast í landi

Enn veit Ingerð ikki, hvussu leingi hon fer at sigla. Tað kann verða, at hon ein dag søkir arbeiði í landi. Royndirnar frá skipunum kunnu væl takast við í land. Hon hevur arbeitt nógv við trygd, staðið fyri umvælingum innan- sum uttanborða og havt nógv fólk undir sær. Haraftrat kennir hon týðandi fólk kring allan heimin. Tað telur ikki einki.

– Hetta er galdandi fyri meg sum onnur. Leiðsluuppgávan er tann sama, uttan mun hvat arbeiðið er.

Tað einasta keðiliga við at sigla við hesum skipunum heldur Ingerð vera donsku skattaskipanina. Fyri at ikki øll hýran skal fara í skatt, kann hon ikki vera í meira enn 84 dagar um árið í Danmark. Tað merkir, at hon ofta er noydd til at halda frí í øðrum londum.

– Hevði tað ikki verið, høvdu óivað fleiri skipsførarar valt hetta arbeiðið, sigur Ingerð.


*MS Queen Victoria er næstan 300 metrar long*